# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Hetlandsvinur fylt 75

20. juni í ár fylti Jóhan Hendrik W. Poulsen professari 75 ár.

Jóhan Hendrik er føddur í Sumba í 1934. Foreldrini eru Niels Winther Poulsen (1902-1990), ættaður úr Skopun, og Kristianna f. Mikkelsen (1904-1985) av Tvøroyri. Jóhan Hendrik búði barnaárini og gekk í skúla í Skopun. Hann tók studentsprógv í 1952. Í 1966 tók hann mag.art. prógv í norrønari málfrøði.



Jóhan Hendrik fekk starv á Føroyamálsdeildini í 1968. Í 1986 varð hann tilnevndur professari í norðurlendskum serliga føroyskum máli á Fróðskaparsetri Føroya. Hann fór frá við eftirløn 1. september 1997.

Jóhan Hendrik er kendur fyri sítt ídna virki fyri føroyskum máli. Fólk kenna hann serliga frá orðabókarsendingunum í Útvarpinum árini 1969-1993. Hesar sendingarnar eru nú savnaðar í bók, Orðabókin, sum forlagið Sprotin gevur út á 75 ára føðingardegi Jóhan Hendriks. Sendingarnar, ið vóru at hoyra 14. hvønn dag vertrarhálvárið, eru 198 í tali.

Jóhan Hendrik hevur skrivað ein hóp serliga um mál og hevur eisini ritstjórnað orðabókarútgávum. Eitt greinasavn Mál í mæti eftir Jóhan Hendrik W. Poulsen útgivið í sambandi við sjeyti ára føðingardag hansara kom út í 2004.

Sum kanska færri vita, so hevur Jóhan Hendrik umframt so mong onnur áhugamál eisini havt serligan tokka til Hetland. Tað sum hugtekur er fyrst og fremst lagnan hjá norrøna málinum í Hetlandi, granskingin hjá Jakob Jakobsen, doktara, men eisini tað siðsøguliga og søguliga.

Jóhan Hendrik situr í nevndini hjá Føroyskum Hetlendskum Vinafelag. Hann hevur nógvar vinir í Hetlandi og hevur tikið væl ímóti mongum hetlandsgesti, sum hevur vitjað í Føroyum.

Føroyskt Hetlendskt Vinafelag ynskir Jóhan Hendrik hjartaliga tillukku við teimum 75 og mong góð ár framyvir.

## Timburmenn og maskinsmiðir



**Timburmenn: F.v.:** Sofus Lognberg, Sandur (Sp/f Norðhús), Odd Norðoy, Klaksvík (Sp/f Hanus Højgaard), Gunnar Olsen Jørgensen, Klaksvík (Sp/f Norðhús), Jógvan Ósá Sivertsen Sp/f Norðhús, Allan við Rætt, Toftir, (Smíðlist), Walther Thomasen Olsen, Hvalvík (Sp/f Nordhaus) og Jan Ljósstein Djurhuus, Klaksvík (Sp/f Norðhús).



**Maskinsmiðir: F.v.:** Hjalti Dan Kristmannsson, Leirvík (P/f Mest), Bogi Johannesen, Skála (P/f Mest), Per Martinson Venned, Søldarfjørður (P/f Mest), Leon Krismar Bjartalíð, Klaksvík (Sp/f Skarðhamar), Torkil Rasmussen, Klaksvík (KJ-Hydraulik), Petur Vágsgarð, Klaksvík (P/F Klaksvíkar Sleipistøð), John Klein Olsen (P/F Klaksvíkar Sleipistøð), Terji S. Petersen, Norðragøta (Normek) og Hans Pauli A. Olsen, Æðuvík (P/F Mest).



PHD-LESANDI

**Fiskaaling hevur fingið stuðul frá Granskingarráðnum til PhD-verkætlanina »Vatngóðska innan aling á sjónum«, og vit søkja í hesum sambandi eftir PhD-lesandi til verkætlanina.**

**Verkætlan**
Í verkætlanini verða mátingar og numerisk model brúkt at greina ávirkanina frá nótum og fiski á vatngóðskuna innan aling á sjónum. Numeriska modeleringin fevnir m.a. um modelering av streymi ígjøgnum og kring alinótir á sjónum, meðan mátingarnar fara fram á sjónum kring eitt alibrúk í Føroyum.

Verkætlanin er eitt samstarv millum Fiskaaling og Náttúruvísindadeildina á Fróðskaparsetrinum, har tann PhD-lesandi kemur at arbeiða saman við royndum granskarum í Føroyum og úti í heimi.

**Ynskiligir førleikar til PhD-lesandi**
- góða universitetsútbúgving í náttúruvísindi ella verkfrøði, t.d. innan havfrøði, veskumekanikk, alivísind, evnafrøði, lívfrøði, alisfrøði og støddfrøði
- áhuga fyri aling og umhvørvi
- hegni til projektarbeiði, numeriska modelering, feltarbeiði og greinaskriving
- royndir við gransking og menning, góðan mál- og telduførleika

Meira fæst at vita um starvið frá Øystein Patursson, granskara, tlf.: 214787, oystein@fiskaaling.fo, Ingolf Joensen, stjóra, tlf.: 214747, ingolf@fiskaaling.fo, ella á www.fiskaaling.fo har m.a. verkætlanarlýsing er at finna.

**Umsókn**
Umsókn við ævisøgu (C.V.) og avriti av prógvum og viðkomandi skjølum skal sendast til: P/F Fiskaaling, Við Áir, Att.: Øystein Patursson, FO-430 Hvalvík. Umsóknarfreistin er 15. august 2009.

**Fiskaaling** er eitt alment partafelag, sum arbeiðir við gransking og menning innan alivinnuna og framleiðir tosk, síl og laks til føroysku alivinnuna. Virksemi á Fiskaaling er góðkent eftir ISO 9001:2000 standardinum. Felagið leggur dent á altjóða granskingarsamstarv við granskingarstovnar og vinnulív.

Á Fiskaaling starvast 5 granskarar, 2 PhD-lesandi og 12 fólk við royndum innan røkt, lívfiskaarbeiði og framleiðslu. Harafturat eru 2 granskarar uttanlands knýttir at felagnum.

Fiskaaling
Aquaculture Research Station of the Faroes

DANAK SYSTEM Reg.no. 5001 Quality System according to DS/EN ISO 9001 by Det Norske Veritas, Danmark A/S DNV